## Hugni í Hugna í Klaksvík

**Fríggjakvøldið fer Dávur Davidsen úr Tjørnuvík at greiða frá endur-minningum í Pensjónistafelagnum Hugni í Klaksvík**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*

Fríggjakvøldið kl. 19.30 skipar Pensjónista-felagið Hugni í Klaksvík fyri tiltaki í Skótahúsinum, har 94 ára gamli, Dávur Davidsen úr Tjørnuvík, fer at greiða frá lívi sínum á sjógvi og landi.

Herfyri kom út bók um Dáva í Tjørnuvík, sum hann vanliga verður róptur, og tað er Sveinur Ísheim Tummarsson í Havn, sum hevur fest orðini á blað.

**Lívssøga**

Alma Petersen, sum er næstformaður í Hugna, væntar, at frásagnirnar hjá Dáva verða spennandi og forvitnisligar at hoyra, og hon vónar, at nógv fólk koma at lýða.

Dávur hevur sett sær fyri at geva út endurminningar, og sum skilst, verður talan um meira enn ta einu bókina.

Fyrsti partur av lívssøgu hansara ber heitið, "Lívssøga 1911-1937".

Í pensjónistafelagnum fríggjakvøldið verður eisini kaffi og køkur at fáa, og bókin um lívið hjá Dáva verður eisini at fáa til keyps. Bókin telir 240 síður og kostar 300 krónur.

**Virkið felag**

Formaður í Pensjónistafelagnum Hugni er Mikjal á Bergi. Felagið húsast í Skótahúsunum, og hvønn týsdag í vetrarhálvuni millum kl. 15 og 18 eru limir savnaðir til prát og hugna.

Alma Petersen sigur, at í desember mánaði, tá ið fólk hava nógv um oyruni, eru limirnir ikki saman hvønn týsdag, men í staðin skipar felagið hvørt ár í desember fyri jólaveitslu.

Í ár verður veitslan, 6. desember, og Alma Petersen vónar, at nógvir limir fara at nýta høvi at tekna seg.

Veitslan verður í hølunum hjá Húsmøðrafelagnum í Bøgøtu 3 í Klaksvík.

Á veitsluni í desember mánaði í fjør vóru eini 70 limir. Hetta var ein stak hugnalig veitsla, og lítið man vera at ivast í, at veitslan hesaferð verður minst líka so hugnalig.

**Stigtakarin**

Pensjónistafelagið Hugni í Klaksvík telist millum tey gomlu feløgini av sínum slagi í Føroyum. Tað er stovnað, 1. oktober 1971, og tað var Anna Joensen, ið var sjúkrasystir, sum tók stig til at stovna felagið.

# Omanlop í Lamba



*- Teimum gomlu dámdi ikki so væl, at fólk bygdu ov ovarliga, sigur Tórfríður Magnussen, sum vísir á, at skúlin í Lamba (mynd) er millum tey ovastu húsini í bygdini á leiðini, har hann býr*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Leygarnáttina leyp úr hamrinum omanfyri húsini hjá bóndanum, Tórfríða Magnussen og Karin Rosenblad, í Lamba**

OMANLOP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var nógvur høgættarvindur og ógvuliga váttligt veður fyrrapartin av vikuskiftinum.

Frætt er um størri og smærri omanlop ella skriðulop ymsastaðni kring landið, og í Lamba leyp eisini undan hamrinum, sum róptur verður Uppi á Bjørgum. Hetta er hamarin omanfyri húsini, har eitt nú bóndin, Tórfríður Magnussen og nærmasti granni, Karin Rosenblad, búgva.

**Steðgaði beint við húsini**

Tórfríður sigur, at skriðulopið er lopið undan hamrinum og er steðgað beint omanfyri húsini hjá honum og Karini.

- Tað sær út til, at lopið er skrædnað úr einum stíggi undir hamaranum og er komið oman móti hegninum, sum er millum húsini. Har er skriðan so steðgað.

Hann vísir á, at eyrur, mold og steinur eru í lopinum, men við tað, at alt helst er komið oman í einum – og tí, at lopið steðgaði, har tað steðgaði, er eingin skaði komin á hús ella ognir.

- Um steinarnir vóru farnir á bólt einsamallir, kundi skaði verið hendur, tí hampiligir steinar eru uppí skriðulopinum, sigur hann.

Tórfríður vísir á, at tað var rættiliga vátt í veðrinum fríggjakvøldið og leygarnáttina, og hetta er helst orsøkin til, at lopið er oman úr hamrinum.

- Í slíkum veðri kann lop spyrjast burtur úr, um tað nógva vatnið sleppur inn undir bakkan. Tá kann tað trýsta so nógv, at tað ríður undan og kemur oman móti ovastu húsunum.

**Er lopið áður**

Hann sigur, at tey annars eru sloppin væl í Lamba í so máta.

- Nøkur ár herfyri leyp oman á eini hús har niðri í bygdini, men annars hevur ikki verið vanligt, at lopið er oman úr tey umleið 20 árini, eg havi búð í Lamba.

Tórfríður sigur, at teimum gomlu dámdi ikki, at sethús vórðu bygd ov ovarliga, men hann sigur seg einki vita um, at álvarslig lop hava verið í Lamba.

- Men tað munnu teir gomlu vita betur um at siga, um so er, leggur hann aftrat.

Í hesum førinum steðgaði skriðulopið beint omanfyri húsini hjá Tórfríði og Karini og gjørdi tíbetur tað ongan skaða.

- Men, sum sagt; vóru teir steinar, sum vóru uppi í skriðulopinum, komnir oman einsamallir og ikki uppi í rúgvuni, kundi ivaleyst skaði verið hendur, sigur Tórfríður Magnussen, bóndi í Lamba.

# Núpur á Klaksvík við fiski av Føroyabanka

**Línuskipið, Klakkur, er eisini á Føroyabanka, og væntandi koma teir inn at landa seinni í hesi vikuni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Í morgun lá línuskipið Núpur og landaði við Kósabrúnna. Teir hava verið á Føroyabanka, og veiðan vá umleið 70.000 pund*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í morgun lá línuskipið, Núpur og landaði við Kósabrúnna. Tað var Fiskamarknaður Føroya, sum landaði skipið, og veiðan varð seld um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaðinum.

Á Kósini vita tey at siga, Núpur hendan túrin hevur verið á Føroyabanka. Samlaða veiðan er 70.000 pund, harav 42.000 pund eru hýsa og 7.000 pund havtaska. Nakað er av toski og øðrum fiskasløgum.

**Arbeiða upsa**

Partrolararnir, Smaragd og Safir, landaðu á Kósini seinasta fríggjadag. Teir høvdu eini 180.000 pund, meginparturin upsi.

Tað hevur gingið væl hjá Smaragd og Safir, síðan skipini komu til Klaksvíkar. Te y plaga at landa eina ferð um vikuna, og á Kósini vænta tey, at skipini koma innaftur seinni í hesi vikuni.

Í morgun fóru tey á Kósini undir at arbeiða fiskin hjá partrolarunum.

**Klakkur á Bankanum**

Línuskipið, Klakkur, er eisini á Føroyabanka, og væntandi koma teir inn at landa seinni í hesi vikuni.